


# Bill spyr um menningarstjóran

**LANDSSJÚKRAHÚSIÐ** Bill Justinussen, løgtingsmaður, hevur sett Aksel V. Johannesen, landsstýrismanni, munnigan fyrispurning um menningarstjóran á Landssjúkrahúsinum

Eirikur Lindenskov

1. Hvørjar eru høvuðsuppgávurnar hjá menningarstjóranum, sum sjálvur fjórði mannar leiðsluna á Landssjúkrahúsinum?
2. Hvussu nógv kostar menningarstjórin og hansara virksemi í føroyska heilsuverkinum í miðal um mánaðin alt íroknað so sum ferðing, íbúð o.a.
3. Hevur menningarstjórin uppgávur fyri aðrar fyritøkur uttan fyri føroyska heilsuverkið, samstundis sum hon er sett í starv á Landssjúkrahúsinum?
4. Verður lønin til menningarstjóran goldin sum A-inntøka í Føroyum ella sum gjald til eina fyritøku?
5. Hvussu hevur hilnast at náa teimum málum, sum sett vórðu í sambandi við setan av menningarstjóra?
6. Hvussu nógv kostar samlaða sjúkrahúsleiðslan á Landssjúkrahúsinum?

Í viðmerkingum til spurningarnar sigur Bill Justinussen, at í apríl í fjør varð kunngjørt, at eitt spildurnýtt starv varð stovnað í ovastu leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.

- Ein menningarstjóri skuldi setast. Endamálið var at fyrireika og verkseta HR-menningarátøk. Eisini var endamálið at fyrireika og verkseta heimtøkuverkætlanir í sambandi við serviðgerð uttanlands. Nú eitt drúgt ár er runnið av tvey-ára skeiðnum hjá menningarstjóranum, er komið fram, at talan er um eina kostnaðarmikla skipan hjá einum fíggjarliga hart kroystum sjúkrahúsi. Tí er umráðandi at fregnast nærri um hetta starvið, sum øllum kunnugt verður fíggjað við føroyskum skattakrónum, sigur Bill Justinussen.

Løgtingsmaðurin heldur tað vera undrunarvert, at uppgávurnar hjá menningarstjóranum fevna heilt frá menningarátøkum fyri



starvsfólk til at betra um viðgerðarligu tilboðini í sambandi við heimtøku av serviðgerðum. Í mong ár hevur áhaldandi verið arbeitt við at taka fleiri og fleiri viðgerðir heim. Hendan tilgongdin er javnt og samt, og tí man okkurt serligt átak vera framt, síðani neyðugt hevur verið at sett ein heilan stjóra í ovastu leiðslu sjúkrahússins til hesa uppgávu, sum til dagligt snýr seg um at økja og betra um læknafakliga kapasitetin. Tí er neyðugt at greiða løgtinginum frá um ávegis úrslitini hjá menningarstjóranum.



**Derhard Jógvansson** nýsettur prestur í Suðurstreymoy

***Ert tú glaður fyri arbeiðið?***
- Hetta er eitt dreymastarv fyri meg. Hetta er ein stór sókn við nógvum møguleikum, og kirkjufólkið bakkar upp um kirkjuna. Eg havi nógv hugskot og dreymar, og eg eri spentur upp á framtíðina í starvinum.

***Hvat fert tú at fáast við fyrstu tíðina?***
- Mín fyrsta tíð verður brúkt upp á at seta meg inn í kjarnuuppgávurnar hjá prestinum og læra frá teimum, sum hava gingið frammanundan. Eg havi sjálvadi nógv hugskot, sum eg kundi hugsað mær at ført út í lívið, men tað kemur við tíðini. Vit ætla at byrja upp á PREP, sum er eitt skeið fyri pør. Eisini verða barnabøkur keyptar til kirkjunar, sum børnini kunnu lesa undir gudstænastuni.

***Tú hevur royndir úr Danmark. Hvørja ávirkan fær tað?***
- Í Danmark var eg sjúkrahúsprestur og hevði nakrar fáar gudstænastur um mánaðin. Í Danmark verður lagdur stórur dentur á sosiala samanhaldið í kirkjuni við kirkjukaffi og líknandi tiltøkum. Tað dámdi mær sera væl, og kundi eg hugsað mær, at vit tóku tað til okkum í Føroyum.

*(Kelda: folkakirkjan.fo)*

## Í MORGIN

**8/11 °C**




Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men kanska sirm ellal mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 14 stig.

## MIKUDAGIN

**7/10 °C**




Fleyr til gul av útsynningi og suðri og fyrrapartin sirm ella mjørki í støðum, men annars turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

## HÓSDAGIN

**9/12 °C**




Fleyr til gul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, menn mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 16 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1029 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer eystureftir. Ein hitabrúgv vestan fyri Føroyar fer eystureftir.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Bretsku Oyggjunum stendur mestsum í stað. Òdnin "DANIELLA" í landsynning úr Cape Race fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 83 mm

### Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

24. august — Fullmáni
25. august — Mánin longst frá jørðini
1. september — Seinna kvarter
8. september — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. aug. | 10:58 | 23:20 | 09:58 | 22:20 | 10:13 | 22:35 | 00:37 | 12:58 | 01:37 | 13:58 |
| 31. aug. | 11:43 | - | 10:43 | 23:37 | 10:58 | 23:52 | 01:20 | 13:43 | 02:20 | 14:43 |
| 1. sept | 00:37 | 12:57 | 11:57 | - | - | 12:12 | 02:37 | 14:57 | 03:37 | 15:57 |
| 2. sept | 01:49 | 14:14 | 00:49 | 13:14 | 01:04 | 13:29 | 03:49 | 16:14 | 04:49 | 17:14 |
| 3. sept | 02:40 | 15:06 | 01:40 | 14:06 | 01:55 | 14:21 | 04:40 | 17:06 | 05:40 | 18:06 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. aug. | 09:13 | 21:35 | 08:13 | 20:35 | 11:13 | 23:35 | - | 12:13 | 10:43 | 23:05 | 11:58 | - |
| 31. aug. | 09:58 | 22:52 | 08:58 | 21:52 | 11:58 | - | 00:35 | 12:58 | 11:28 | - | 00:20 | 12:43 |
| 1. sept | 11:12 | - | 10:12 | 23:04 | 00:52 | 13:12 | 01:52 | 14:12 | 00:22 | 12:42 | 01:37 | 13:57 |
| 2. sept | 00:04 | 12:29 | 11:29 | 23:55 | 02:04 | 14:29 | 03:04 | 15:29 | 01:34 | 13:59 | 02:49 | 15:14 |
| 3. sept | 00:55 | 13:21 | - | 12:21 | 02:55 | 15:21 | 03:55 | 16:21 | 02:25 | 14:51 | 03:40 | 16:06 |